Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

Maritim fyrireiking
Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið í maritimari fyrireiking mánadagin 7. august 2000 og endar við prótvøku í desember 2000. Lokið prógv gevur atgongd til víðari lestur á maskinmeistaraskúla og navigatiónsskúla. Til ber at søkja útbúgvingarstuðul.

Støddfrøði á hægri støði
Um nóg nógv tekna seg, skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli – í samstarvi við Maskinmeistaraskúlan og Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum – fyri skeiði í støddfrøði á hægri støði fyri maskinmeistarar og onnur.

Skeiðið er ætlað sum partvísur sjálvlestur, og byrjar týsdagin 1. august 2000 og endar við skrivligari og munnligari prótvøku um miðjan oktober 2000. Lokið prógv gevur atgongd til støðisútbúgvingina í støddd- og alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Upptøkukrøv:
- maskinmeistaraprógv
- skipsføraraprógv
- studentsprógv við støddfrøði B, alisfrøði B og evnafrøði C ella
- onnur tilsvarandi útbúgving í støddfrøði og alis-/evnafrøði.

Høvuðsevnini í undirvísingini eru:
Vektorar í 2 og 3 dimensiónum, vektorfunktiónir, serligar funktiónir, markvirði, infinitesimalrokning, differentialrokning, integralrokning, differentiallíkningar.

Undirvísingartilfar:
Preben Madsen: Teknisk matematik bind 2 og 3.
Erhvervsskolernes forlag 1997
Hewlett Packard:
HP48 roknimaskina og HP48 Brugerhåndbog.

Tilmelding:
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli
Frúutrød 1 • Postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

Skopunar skúli

Søkt verður eftir lærara 17 1/2 t. um vikuna til skúlaárið 2000-2001.

Starvið er tíðaravmarkað. Verður lønt sambært avtalu millum lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið. Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 30. juni 2000.

Skopunar skúlanevnd
240 Skopun

Randarhús Millum Gilja

Um hóskandi boð fæst verða eini randarhús Millum Gilja lýst til sølu. Húsini eru bygd í 1988/89, hava krúpikjallara, 2 hæddir og loft.

Stovuhæddin er 69 m², miðhæddin er 59 m², og loftið er 30 m². Grundøkið er 232 m² til støddar. Gjørt er framman og aftanfyri húsini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøta 9
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

Tlf. 311145

Frá Javnaðarflokkinum

Summarstevna 2000
verður
16. og 17. juni í Norðoyggjum

Skrá:
Fríggjadagin
kl. 20.00 Alment mentunarkvøld í Atlantis

Leygardagin
kl. 09.00 Útferð til Mikladals (farið verður frá ferjuleguni í Klaksvík)
kl. 14.00 Fundur í Avhaldshúsinum í Mikladali (viðrar verður fundurin uttandura)
kl. 19.30 Veitsla í Skálanum í Klaksvík

Javnaðarflokkurin

Kvívíkar kommuna

Søkt verður eftir umsjónarfólki til Válakei at byrja 1. juli 2000.

Umsóknir skulu vera Kvívíkar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Kvívíkar kommuna
Boks 30 • 340 Kvívík • Tel. 421294

Almenn skeið á Fróðskaparsetri Føroya 2000/2001

1) Prótskeið í føroyskum
Skeið fyri tey, ið hava føroyskt sum móðurmál.
byrjar *á Føroyamálsdeildini* 11. september í einum flokki við undirvísing mánadag og mikudag, báðar dagar kl. 16.15–18.30.

Lærari: Ása Magnussen.

2) Prótskeið í enskum
a) Skeið til Cambridge Certificate in Advanced English
byrjar *á Føroyamálsdeildini* 14. september í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00–16.00.
- Fortreytir: Miðnámsstoði A/B ella samsvarandi kunnleiki, eitt nú Cambridge FCE-royndin, førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English
byrjar *á Føroya Landsbókasavni* 13. september í einum flokki við undirvísing mikudagin kl. 9.00–12.00.
- Fortreytir: Staðið »Advanced English«, málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Prótvøkurnar verða í mai/juni 2001.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarblað eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til **11. august 2000**. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.
Tilmeldingargjaldið er 550 kr.
Fyri prótvøku í føroyskum gjalda næmingar 300 kr.
Fyri prótvøku í Advanced English gjalda næmingar 800 kr.
og fyri prótvøku í Proficiency 900 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 31 53 02
Handan Á 5

Ung í arbeiði 2000

Klaksvíkar kommuna hevur fingið játtað pening frá Føroya Landsstýri til arbeiðsskapandi tiltøk fyri ung.

Arbeiðsleys millum 16 og 26 ár kunnu koma á býráðsskrivstovuna at fáa umsóknarblað.

Umsóknarbløðini skulu vera okkum í hendi innan 24. juli 2000.

Klaksvíkar kommuna

Foreldur á Tvøroyri gera uppreistur

Foreldur at børnum í 8. flokkum á Tvøroyri eggja nú til uppreistur, tí 8. flokkarnir har mugu leggjast saman. Orsøkin er frymilin, ið tímar verða lutaðir eftir til ymsu skúlarnir í landinum. Nú er nevniliga so, at størru skúlarnir, sum eru í miðstaðarøkinum, hava fyrimun, meðan útjaðarin bløðir. Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum eru tey greið yvir trupulleikan, sum tey siga ikki er so einfaldur at loysa

Dagfinn Olsen

Mong eru av teirri áskoðan, at tímabýtið í fólkaskúlanum í miðstaðarøkinum og í útjaðaranum er ikki rætt. Á Tvøroyri hava foreldur tikið hetta í álvara og eru farin til verka.

Í vikuni høvdu foreldrini at børnum í 8. flokkunum á Tvøroyri fund og úrslitið er skriv, dagfest 14. juni 2000, har tey eggja til uppreistur, tí mett verður, at landsins myndugleikar syndra skúlan og børnini eru við sviðusoð.

Frymil og uppreistur
Í skrivinum, sum ber heitið »Tvørafólk - gerið uppreistur«, átala foreldrini tær sømdir, sum børnini fáa í skúlanum. Foreldrini at børnum í 8. a og b í skúlanum á Tvøroyri eru nevniliga komin í ta støðu, at komandi skúlaár skulu flokkarnir leggjast saman, so talan verður um ein flokk við 29 næmingum. Hetta vegna vantandi tímatal.

Víst verður á, at skúlar fáa tillutaðar tímar eftir einum frymli. Hesin frymil er so háttaður, at helst skulu vera 24 næmingar í flokkunum, tí so er eingin trupulleiki við tímum.

Í skrivinum siga foreldrini, at í Suðuroynni er av góðum grundum soleiðis, at tað eru ikki 24 næmingar í øllum flokkum og tí fæst ikki nøktandi tímatal.

Í skrivinum siga foreldrini millum annað: Vit foreldur **krevja**, at landsins myndugleikar **syrgja fyri** at okkara børn fáa sama tilboð um undirvísing eins og onnur børn kring um landið! Hesin rættur skuldi verið tryggjaður børnum okkara í fólkaskúlalógini, har ongin munur átti at verið, líkamikið hvar í landinum ein býr. Í løtuni er hetta als ikki galdandi fyri skúlar í Suðuroynni. Okkara børn verða stórliga diskriminerað, tá undirvísingartilboðum viðvíkur. Vit foreldur **krevja,** at UMMS **broytir** verðandi, ónýtiliga frymil, so hesin kann nýtast til minni skúlar, har næmingatalið er undir 300.

Miðstaðarøkið og restin
Foreldrini á Tvøroyri meta, at talan er um mismun og koma við áhugaverdari meting, nú myndugleikarnir arbeiða við útoyggjum og økismenning.

Í skrivinum verður sagt: Sum nú er, og við verðandi frymli, er UMMS í fer við at býta undirvísingartilboðini í skúlaverkinum sundur í tveir flokkar . Miðstaðarøkið við nokk av tímum, har avbjóðingarnar í skúlanum eru í tráð við nýggju fólkaskúlalógina; og útjaðarin við alt ov fáum tímum, har skúlin illa nokk hongur saman. Er hendan gongdin tilætlað og framhaldandi, so **skulu** vit eisini gjalda skatt samsvarandi!!

Vita av trupulleikanum
Hensar Ellingsgaard frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum sigur, at arbeitt verður við trupulleikanum, sum foreldrini á Tvøroyri vísa á. Hann hevur tó ikki sjálvur sæð skrivið frá teimum. Hann sigur tó, at avgerin at leggja flokkarnar á Tvøroyri saman er nakað, sum skúlaleiðslan á staðnum tekur støðu til.

Men Hesar Ellingsgaard vísir á, at tá frymilin kom í síni tíð, var tað fyri at fáa eitt rættvísari býtið av tímum. Hann viðgongur tó, at seinni eru fólk so komin eftir, at hetta er ikki so einfalt.

Men á UMMS vita tey hesum trupulleika. Hensar Ellingsgaard sigur, at arbeiðsbólkur situr og arbeiðir við trupulleikanum, tí myndugleikarnir eru greiðir yvir, at hetta er ein trupulleiki, sum okkurt má gerast við.

Men Hensar Ellingsgaard leggur dent á, at hesin trupulleiki verður ikki loystur til komandi skúlaár. Hann hevur tó góðar vónir um, at ein loysn verður funnin, tá skúlaárið 2001/2002 byrjar.

Tískil letur til, at foreldur, ið ikki búgva í miðstaðarøkinum, har frymlin hjá UMMS er gávumildur, mugu brynja seg við toli.

Ivory, Kári og Hanus á pall

Um vikuskiftið fer manningin í Ivory á pall í Gøtu og í Havn og Hanus Johansen gevur út nýggja fløgu, nú hann fyllir 50 ár

Dagfinn Olsen

Ivory er nýggja navnið á Eivør Pálsdóttir kvartett og talan er tískil um jazztónleik.Um vikuskiftið verður bólkurin á palli í Gøtu og í Havn og eisini eru fólkatónleikarar við.

Leygarkvøldið 17/6 klokkan 21 skipar felagið Grót fyri konsert í Losjuni í Gøtu. Á skránni eru Ivory og Kári Sverrison.

Hanus fyllir fimmti
Sunnukvøldið 18/6 klokkan 20 skipar Havnar Jazzfelag fyri konsert á Gamla Meiarfi í Havn.

Á skránni eri Ivory og eisini Hanus Johansen, sum hetta kvøld gevur út nýggja fløgu, í samband við, at hann fyllir 50 ár. Fløgan nevnist Bouquet, og er úrslit av samstarvinum millum Hanus og klassiska bólkin Aldubáran.

Bátur í knús og menn í vanda

Týsmorgunin breytt brimið rættiliga í Skúgvi og ein bátur fór í knús og aðrir fingu skaða. Eisini kundi mannskaði verið

Dagfinn Olsen

Ódnarveðrið týsmorgunin gjørdi um seg í Skúgvi, har stórur skaði hendi í brimi í bátahylinum.

Hans J. Henriksen sigur, at boðað var frá góðum líkindum og menn hugsaðu tí ikki um at taka bátarnar upp. Útsynningur var og tað er eisini góð ætt, men seinni kom hann av útnyrðingi og menn gjørdu seg klárar at taka bátarnar upp. Hetta var týsmorgunin um hálvgum nýggju tíðina.

Tað eydnaðist ikki at bjarga einum fimmmannafari, sum var í góðum standi og var væl útgjørt. Tað fyltist og lá til ónaðir í hylinum, áðrenn tað fór í knús.

Menn royndu at fáa bátar upp, men hetta var trupult. Tískil fingu eisni aðrir bátar skaða. Millam annað eitt 7 mannafar og eitt 10 mannafar.

Menn í vanda
Menn stóðu undir garðinum á bryggjuni og har síggja teir ikki, hvat fer fram hinumegin garðin. Tvey brot komu yvir menninar, men teir fingu í ein enda og fingu hildið sær á landi. men her var rættiligur vandi á ferð og støðan kundi verið verri, siga tey í Skúgvi.

Frammi hevur verið, at bátahylurin í Skúgvi er ikki, sum ætlað. Millum annað eru skúvoyingar illa nøgdir við, at dýpið er ikki, sum ætlað og rættarsak er við Landsverkfrøðingin um hetta.

Hans J. Henriksen metir tó ikki, at dýpið í hylinum hevði nakað at siga týsmorgunin. Men hann vísir á, at hylurin sum heild er ikki, sum menn í Skúgvi vildu hava hann at vera. Hann vendir ikki rættan veg. Eisini vísa skúvoyingar á, at ein kann ikki ganga og draga bátar oman og niðan, sum í gomlum døgum, tá nýggjur bátahylur er komin fyri nógv milliónir krónur.

Hans J. Henriksen sigur, at í Skúgvi er tey fegin um, at eingin mannskaði hendi, tí hitt fæst aftur so ella so.

DAGFØR TEG HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.